Viðmerkingar til LM-067/2022 : Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd (Náttúruverndarlógin)

Hagafelag Føroya fegnast um, at uppskot um náttúru-verndarlóg er lagt aftur fyri løgtingið. Felagið vónar, at Føroyar nú loksins fáa tíðarhóskandi lóggávu innan náttúruvernd.

Ein tíðarhóskandi lóggáva í hesum sambandinum er ein lóggáva, sum tekur støði í aðaltankanum um burðardygd. Nevniliga at *"Burðardygg menning er ein menning, har tørvurin hjá núlivandi ættarliðum kann nøktast, uttan at minka møguleikarar hjá komandi ættarliðum eisini at nøkta sín tørv*", soleiðis sum tað stendur í Brundtlandrapportini frá 1987.

Ein tíðarhóskandi lóggáva um náttúruvernd má ikki bara hugsa um nútíðina, men eisini um komandi ættarliðini.

Vit kunnu ikki lata ta evarska stuttu tíð, eitt ávíst ættarlið livir og virkar her á landi, hava so stórt inntriv í náttúruna, at komandi ættarlið vera fyri vanbýti. Vit mugu tryggja, at náttúran verður fyrisitin skilagott, heildini og framtíðini at gagni.

Føroyum tørvar eina náttúrufyrisiting, sum á fakligum grundarlag fyrisitir okkara náttúru við fyriliti fyri margfeldinum, landinum sum heild og sum hugsar tvørtur um ættarlið.

Nógvar fánýtis royndir
Verandi náttúruverndarlóg er frá 1970, men uppskotið til ta lógina stavar heilt frá 1959.

Seinastu árini eru fleiri royndir gjørdar at fáa nýggja lóg um náttúruvernd.

Longu í 2001 staðfesti ein arbeiðsbólkur, at náttúrufriðingarlógin als ikki nøktaði tørvin á náttúrufyrisiting í Føroyum. Fleiri royndir eru gjørdar at útvega Føroyum eina tiltrongda náttúruverndarlóg og náttúrufyrisiting, men til fánýtis.

Hagafelagið vónar, at tað hesa ferð ber á mál at útvega okkum og okkara eftirkomarum eina hart tiltrongda náttúruverndarlóg.

Týdningarmiklar ásetingar í §1

Felagið vil vísa á §1, ið lýsir endamálið við løgtingslógini, sum ein sera týdningarmiklan og grundleggjandi part av lógaruppskotinum:

”§ 1.Endamálið við løgtingslógini er at røkja margfeldið og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í náttúruni, bæði fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini”.

Tað er týdningarmikið at viðurkenna í lóg, at vit skulu verja og røkja náttúrumargfeldið fyri náttúruna sjálva. At vit síggja náttúruna sum havandi eitt virði í sær sjálvari, sum ikki neyðvendigvís er knýtt at menniskjum og tí nyttuvirðinum (og tíverri eisini útnyttingarvirðinum) hon kann geva menniskjum.

Men menniskjuni hava sjálvandi eisini týdning, og tað ásannar lógin. Hon staðfestir nevniliga, at vit skulu ansa eftir náttúruni, so hon kann vera grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini.

Tað er sera týdningarmikið, at lógarteksturin er komin inn í nútíðina og tekur støði í veruleikanum.

Øll vita eftirhondini, at náttúran er eitt týðandi grundarlag undir mentan, heilsu og trivnaði. Føroyingar hava stóran tokka til náttúruna, og tí er umráðandi at viðurkenna, at náttúran hevur fleiri funktiónir enn bara at vera uppvakstrarøki hjá seyði. Tað skal náttúran eisini vera, men ikki bara.

Fjøltáttað amboð til økisvernd
Hagafelagið metir eisini, at tað er sera umráðandi at fáa nøkur amboð til økisvernd í føroysku náttúruni.

Í kapittul 4 verða nevnd nøkur áhugaverd amboð til økisvernd, sum taka støði í, hvat slag av øki talan er um, og at tað kunnu vera ymisk sløg av vernd, ið kunnu brúkast sum amboð. Hetta er vælkomið og tiltrongt.

Sum heild
Náttúran er viðkvom, djórasløg og plantur hvørva hvønn dag kring heimin, og tað er av avgerandi týdningi, at eisini vit í Føroyum taka týðandi stig til at verja og menna okkara náttúru.

Hagafelagið metir, at hendan náttúruverndarlógin er eitt gott stig á leiðini.

Undir hoyringini hevur ein ávísur bólkur róð fram undir, at 1) uppskotið til náttúruverndarlóg skal vera brot á ognarrættin, og at 2) øll fyrisiting av jørðini verður flutt til Havnar. Mælt verður til at 3) lógin verður sett á standby, og at ein arbeiðsbólkur (aftur nú!) verður settur at kanna ymiskt.

Tey, sum bara kenna eitt lítið sindur til føroyskan politikk, kenna hesar vanligu obstruktións-manøvrurnar aftur (endugjaldskravið, havnartrøllið og súltukrukkan), tá ið mann vil, at onki skal henda.

Hagafelagið hevur fult álit á, at okkara løgtingspolitikarar ikki lata seg trýsta, og at teir velja náttúruna – til frama fyri alt fólkið og framtíðina.

Vinarliga

Hagafelag Føroya